

# Óttast at oljuprísurin fer at hokna í vár

**Jógvan Hugo Gardar**

04.12.2015 - 10:15

Oljan.fo

Rávørugreinarin hjá SEB, Bjarne Schieldrop, sigur, sambært tíðindastovuni Reuters, at tað er sera lítil møguleiki fyri at OPEC-londini klára at fáa eina avtalu við oljulond uttanfyri felagsskapin um at minka um oljuframleiðsluna.

Hetta sigur Schieldrop í samband við at OPEC-londini hittast til toppfund í dag.

- Møguleikin fyri at oljuprísurin kemur at hoknað, og lækka til eitt óvanlkiga lágt støði er stórur nú í vár. Hetta fer at leggja trýst á oljuframleiðandi londini til at gera okkurt fyri at fáa prísin til at hækka frá einum prísi sum kann koma at liggja millum 20 og 30 dollarar fyri fatið, sigur hann sambært Reuters.

Í gjár bórust tíðindir um at Saudi-Arabia kann koma at skjóta upp at minka um oljuframleiðsluna á OPEC-fundinum í dag. Men hesum afturvísa keldur í Saudi-Arabia,

sambært TDN Finans. Tí roknað tey flestu við at OPEC ikki kemur at gera nakrar broytingar á fudinum í dag.

Norðsjóvaroljan Brent er hækkað nakað hesa vikuna, og liggur í løtuni um 43,80 dollarar fyri fatið. Amerikanska lættoljan kostar í løtuni 41,20 dollarar fyri fatið.

Kreppan í Miðeystri, og bumbingarnar av oljuøkinum al-Omar og oljuflutninginum hjá ISIS, ger at oljuprísurin kvinkar upp í løtuni. Tøl úr USA vísa at oljugoymslurnar framvegis eru á tremur.